VIÐMERKINGAR

Býráðið – næstu fýra árini

Páll Michelsen
Valevni javnaðarfloksins

VAL04

Til hvørt val koma okur øll at seta okum henda spurning, og gera okkum nakrar tankar um, hvussu vit vænta og vóna at býur okra mennist tey næstu 4 árini.

Komandi býráð kemur at fáa nógvar krevjandi uppgávur. Nevnast kunnu uppgávur innan barnaansingina, skúlaverki, eldraøki, helsuverki og betran av karmum fyri vinnuna. Um tað er at byggja hús, seta okkurt vinnuvirki á stovn, ella hava onnur mál, ið koma undir kommunalu umsitingina, má býráðið tryggja eina

- Vælvirkandi umsiting
- Sakliga málsviðgerð
- Ábyrgarfulla fíggjarstýring
- Góða vegleiðing
- Góðar umstøður

Eitt nývalt býráð eigur at hava sum fremsta mál tryggleika og trivnað borgarans, at umsita og varðveita øll virðini í býnum, fáa tað at bera til búskaparliga og vinnuliga, so at býurin verður lokkandi hjá bæði fyritøkum, familjum og einstaklingum, tí har gróður er í vinnuni og samfelagnum, búsetir fólk seg.

Tá ið børnini eru komin í skúlaaldur mugu vit bjóða teimum bestu møguligu karmar. Eitt vælútbygt skúlaverk við góðum møguleikum hjá næmingunum til at mennast bæði andaliga og tekniskt. Tað er ikki ov nógv sagt, at tá ið tað kemur til at skapa góðar karmar fyri einum góðum undirvísingarverki, so hevur okra kommuna gingið á odda. Hetta kemst sjálvandi av, at ein av grundhugsanunum í javnaðarhugsjónini er jú, at okur skulu hava eitt vælútbúgvið fólk, og at øll skulu hava somu møguleikar til at nema sær kunnleika, óansætt stætt og fíggjarligu møguleikar foreldranna. Saman við ynskinum um arbeiði til allar hendur er eitt av høvuðsmálum okara, ein góð útbúgvingarskipan við somu møguleikum til øll. Tað er gleðiligt at ásanna, at stórt sæð allir flokkar í dag hava tikið hesa hugsan til sín, men vandi er í hvørjari vælferð. Soleiðis eisini her. Tí fara okur at standa á odda fyri at geva fólkaskúlanum bestu umstøður at arbeiða undir, soleiðis at øll okra børn hava somu møguleikar til lærdóm og útbúgving.

Eisini vita okur, at tann mennig ið verður á staðnum byggir á tað, tey undanfarnu ættarliðini hava stríðst og knógvað fyri. Teimum, ið hava búleika her á staðnum og lagt lunnar undir tað støðið vit hava í dag, vilja vit veita sømulig kor nú teirra arbeiðsorka er farin at vikna. Arbeiðast má fram í móti at eldrarøktin og umstøðurnar hjá teimum eldru gerast betur. Javnaðarflokkurin vil altíð standa sum tann flokkur ið vil tryggja teimum eldru góð kor. Hús eru keypt til eldrasambýli og framhaldandi má arbeiðast við at fáa fleiri sambýlispláss. Eisini mugi okur áhaldandi arbeiða fram í móti at økja tali av røktarheimsplássum. Hartil mugu okur leggja stóra orku í at tær kommunalu uppgávurnar, í samband við Suðuroyar sjúkrahús verða væl røktar. Sum valevni javnaðarfloksins fari eg at streingja á, at arbeiði heldur fram at útvega teimum eldru lættastu og bestu liviumstøður.

Betri bussleið kundi loyst fleiri trupulleikar

Tórfinn Smith
Valevni Javnaðarfloksins til býráðsvalið

VAL04

Ferðslutrýstið á vegirnar í Havn er øgiligt. Býráðið hevur roynt at bøta um. M.a. við fleiri rundkoyringum, sum eru til munandi bata. Tær skulu eisini til. Tað styttir eitt sindur um tíðina at koma oman í býin um morgunin, og úr aftur býnum seinrapartin. At finna eitt parkeringspláss er eisini ein trupulleiki, ert tú ov seinur á sjóvarfallinum.

Eftir mínum tykki kunnu vit gera eins nógvar rundkoyringar sum okkum lystir, og sama við parkeringsplássum, so loysir hetta bert ein part av trupulleikunum. Og so als ikki framtíðartrupulleikarnar, tí ferðslan økist í hvørjum. Her eru snøgt sagt ov nógvir bilar í mun til vegakervið og parkeringsplássini vit hava. Ikki minst skal havast í huga, at mark er fyri, hvussu nógv skal leggjast undir asfalt og betong.

Annað málið, í sama sambandi er, at tey, sum búgva í útjaðaranum í býnum, eru, um tey vilja ella ikki, noydd til at rokna ein ella fleiri bilar í húsarhaldskostnaðin. Møta ymiskar tíðir til arbeiðis, ella hava ymiskan tørv á flutningi.

Vit hava eina bussleið, sum fáur í dag vil vera fyri uttan. Men hendan kann gerast munandi betri. Bæði fyri dagliga flutningstørvin og ikki minni, hugsað vit um okkara dýrabæra umhvørvi.

Tí eigur komandi býráð álvarsliga at umhugsa møguleikan at víðka bussleiðina heilt munandi.

Eitt hugskot hevði verið, at tvífaldað títtleikan í buss-skipanini.

Hetta hevði m.a. havt við sær:

- At ikki var neyðugt at bíða leingi eftir næsta bussi
- At fólk harvið nýttu bussleiðina munandi meira
- At tú slapst undan parkeringstrupulleikum, skuldi tú eitt ørindi í býin
- At ikki var neyðugt at írokna ein ella fleiri bilar í húsarhaldsroknskapin, og at tú harvið kundi brúkt pengarnar til okkurt annað, sum var meira skilagott
- At vit sluppu undan munandi luftdálking
- At vit sluppu undan munandi vegasliti og harvið dálking orsakað av asfaltdusti
- At kommunan spardi pening at gera p-pláss
- At komunan spardi pening til asfalt-umvælingar

Hetta hevði kostað kommununi meira fyrstu tíðina, men eg eri sannførdur um, at vit, sum tíðin líður, høvdu spart munandi kommunu- og landsbúskaparligt, og ikki minni, at hvør einstakur hevði verið betri fyri, - bæði so og so.

Vert at hugsa um.

Býarmenning og heildarætlan

Jógvan Arge
býráðslimur fyri tjóðveldisflokkin

VAL04

Eitt tað størsta prinsipiella málið, sum hevur verið frammi farnu býráðssetuna, er ein nýggj heildarætlan fyri Havnina.

Hetta málið endaði við, at meirilutin í býráðnum samtykti at vaksa um býin við einvíst at leggja Hoyvíkshagan av til grundstykkir.

Vit í minnilutanum atkvøddu ímóti hesi ætlan, tí vit hildu ikki javnvág vera í henni.

Vit mæltu beinleiðis til, at atlit eisini vórðu tikin til sjónarmiðini hjá teimum, sum virka í Hoyvíkshaganum í dag, men tað varð alt feiðað av borðinum.

Listi E hevur verið á rundferð í kommununi og lurtað eftir, hvat fólkið í teimum verandi og komandi bygdunum hevur at siga.

Har kom klárt og týðuliga fram, at fólk eru bangin um, hvat eitt fyrilitarleyst stýri á Vaglinum í Havn kann finna upp á gera við teirra bygdir og umhvørvi.

Høvdu vit í minnilutanum ikki verið so trek, hevði býráðið longu havt gjørt eina samtykt um at leggja so at siga allan Kollafjørð undir asfalt og betong eftir nøkrum árum.

Høvdu vit í minnilutanum ikki treiskast í málinum um at gera ruskpláss í nátúrperluni á Glyvursnesi, so hevði tann ætlanin verið samtykt nú fyri valið.

Vit í tjóðveldisflokkinum vilja taka atlit til teir nýggju partarnar av kommununi.

Vit halda ikki, at nakrir fáir politikarar í Havn uttan fyrilit kunna fara við teimum, sum teimum lystir. Stigini mugu takast í góðum samljóði við tey, sum byggja hesar bygdir.

Í sama andrátti siga vit, at heildarætlanin fyri Havnina skal takast uppaftur. Hon vendir skeivt. Hon beinir fyri vinnumøguleikum, og næstan øll ferðslan inn í býin fer at koma úr einum horni.

Vit meina, at í nýggju heildarætlanini skal havast í huga, at Havnin eisini verður útbygd vestureftir, har stórt lendi er tøkt.

Tann nýggja heildarætlanin skal tryggja meiri javnvág í býarmenningina, so Vesturbýurin og Argir fáa javnbjóðis umstøður við Eysturbýin og Hoyvíkshagan.

Hetta tryggjar samstundis, at tann nógva ferðslan inn í býin verður býtt í ymsar ættir.

Og fram um alt hava vit sett okkum fyri, at borgararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um fram-tíðarætlanirnar.

Ert tú samdur við okkum, velur tú Lista E á valdegnum 9. november.

Nýggja býráðið

Birgir Sondum
x við lista E

VAL04

Eitt tað besta vit (vónandi komi eg inn) í nýggja býráðnum mugu fara í gongd við, er at fáa tey løgtingsvaldu fyri suðurstreym, helst alt løgtingið at skilja sjónarmiðini hjá stórkommununi.

Tað má ikki koma uppá tal at stovnar verða fluttir úr kommununi. Hvar nýggir stovnar verða lagdir er ein onnur søk. Øll lond hava brúk fyri einum sterkum høvuðsstaði.

T.d. tarnar landið okkum at útbyggja eldraøkið, við at játtanir frá landinum eru alt ov lágar, og ofta eru oyramerktar til útjaðaran, hóast øll vita at tørvurin er størstur í Havn.

Gongd má koma á byggingina av skúladeplinum í Marknagili.

VIÐMERKINGAR

Tvøroyri, býurin, har øll kunnu trívast

Jens Johannesen
Tvøroyri, býráðsvalevni Javnaðarfloksins

Kommunan hevur havt stóra skuld at dragast við tey seinastu nógvu árini. Hon hevur at kalla verið skuldarbundin í fleiri ár. Á seinasta býráðsfundi varð upplýst, at skuldarbyrðan hjá kommununi eru einar 80 mill., ella við øðrum orðum tvær álíkningar, tí upplýst varð samstundis, at inntøka kommununnar var góðar 40 mill.. Tað kostar kommununi um 13 mill. um árið í rentum og avdrátti, so um eini tvey-trý ár fer at nærkast einari álíkning í skuld. Um rætt verður borið at, so er tað ein stórur møguleiki fyri, at okur um stutta tíð kunnu fara at hugsa um at nýggjar íløgur. Í komandi ári verður barnafrádrátturin 4.500 kr..

Tvøroyri skal gerast ein tryggari býur, tá tað snýr seg um tryggleika hjá børnum í ferðsluni. Á Sevmýrisvegnum og aðrastaðni í býnum eiga okur at gera trongar, so at bilarnir verða noyddir at minka um ferðina. Vegastrekkir, sum líkjast teimum úti undir Heygnum, eiga at breiðkast. Og sjálvandi skal býráðið bjóða slík arbeiði út, so tað kann gerast so bíligt og skjótt sum gjørligt.

Tvøroyrar býur skal vera góður og dragandi at búgva í. Trivnaðurin skal koma okum øllum tilgóða. Okur skulu fara væl um allar borgarar í sóknini, allir skulu vera líka fyri lógini, øll skulu kenna seg trygg. Hetta kann gerast við, at heilt nágreiniligar reglur eru fyri tey ymisku økini í kommununi, soleiðis at borgarin veit hvørjar skyldur og rættindi hann/hon hevur, tá tað snýr seg um ivamál. Tað eigur ikki at vera so torført at stýra, tá tú veit, hvør kósin er.

Í kommununi skulu øll trívast væl, bæði eldri og yngri. Okur halda ofta at hesi eru bara grenj, men sætt er tað, at hesi báðir bólkar næstan eru heilt gloymdir. Kommunan hevur onki hølið at vísa okra eldru á. Okur skulu virða tey eldru betur. Atburðurin móti okra eldri hevur ikki verið serliga góður. Her skal vend koma í.

Eisini tey ungu, ið ikki íðka tann vanliga ítróttin, skulu okur hugsa um. Umstøðurnar skulu vera góðar. Eitt ungdómshús eigur at finnast, har okra ungdómur kann hittast eftir skúlatíð undir tryggum, rús-og roykfríum umhvørvið. Her skal sjálvandi útbúgvið fólk vera til staðar. Her eru bert nøkur fá hugskot, sum uttan stórvegis kostnað, kann verða til gleði og til gagns fyri øll.

Øll skulu trívast í okra býi.

Tað ger onki um nýggj andlit koma inn í býráðið. Set tín kross við meg tann 9. november, ella við eitt av okra valevnum á javnaðarlistanum.

Staðbundu nevndirnar og Tórshavnar Býráð

Annfinn Brekkstein
valevni Sambandsfloksins til býráðsvalið

VAL04

Nú Suðurstreymoy verður ein kommuna, hava bygdirnar, sum hava lagt saman við Havnini, innbygt í samanleggingarsáttmálan at hava staðbundnar nevndir.

Uppgávan hjá hesum nevndum er at ráðgeva og vegleiða býráðið í ymiskum málum og at kunna borgarstjóran og harvið býráðið um, hvat rørist í bygdunum, hesar nevndir umboðað. Eisini eiga hesar nevndir at verða kunnaðar og at fáa høvi til at vegleiða og koma við meiningum, tá stórar broytingar verða framdar í teirra bygdum.

Tey fólk, ið nú verða vald í nýggja býráðið, hava skyldu til at fylgja við í allari kommununi, frá tí norðastu og út á smáplássini Hest, Koltur og Nólsoy o.s.fr.

Skulu fólkini í hesum bygdum kenna seg sum part av stóru kommununi, javnbjóðis við tey í meginøkinum — hetta er uppgávan hjá tí nývalda býráðnum at syrgja fyri, nevnliga at servisera allar borgarar líka í allari kommununi — setir tað krøv til tey fólkavaldu, nevnliga at fáa samansjóað allar borgarar í nýggju kommununi, so øll fáa javnbjóðis rættindi, óansað hvar tú býrt í kommununi. Tá ber av sonnum til at tosa um nærdemokrati.

Tað er ikki rætt at útdelegera heimildir til tær staðbundu nevndirnar, tí tá vendir samanleggingin á høvdinum. Hinvegin kundi nývalda býráðið havt eina felagskonto á fíggjarætlanini, sum var oyramerkt til smáplássini. Ella rættari sagt: til menning og trivnað á smáplássum. Tað kundi verið eitt hugskot.

Allir borgarar í kommununum, sum hava lagt saman við Tórshavnar kommunu, verða nú borgarar við somu rættindum og somu skyldum sum allir aðrir í felagskapinum. Vit koma at fáa og njóta, missa og svíða, í sama lagi og í góðum og rættvísum samstarvsanda og solidaritetsfatan. Hetta skal vera eyðkennið hjá tí nýggju Tórshavnar kommunu, tí tá hava vit eitt sterkt demokratiskt fólkaræði.

Men lat okkum ongantíð gloyma, at tað eru teir fólkavaldu býráðslimirnir, sum eru valdir at umboða alt fólkið í tí nýggju Tórshavnar kommunu.

Havnin er um at missa sálina

Kári Árting

VAL04

Hetta segði ein havnarmaður við meg ein dagin. Prátið var fallið inn á gartnaríið hjá Torstein, sum lá har yvir av SMS. Kommunan hevði skund at selja økið, so okkurt spekulasjónsbyggjari kundi klamsast upp har, í staðin fyri at lata onkran føra driftina víðari undir treytum, ella at lata tað fella saman við tí grøna økinum omanfyri. Lukkutíð fyri okkum øll, sýnist tað nú sum treytirnar sum býráðið fekk hesa stórfingnu gávu undir, forða fyri, at bygt verður á økið. Hetta er tíverri ikki eindømi av snævurskyggni og umhvørvisvandalismu. Vit harmast um tróðna við Jóannesar Paturssonargøtu og um skúlabyggingina við Kongagøtu, samstundis sum vit fegnast um, at Tinganes bleiv bjargað. Kirkjubøsjingar tit eru við í komununi nú, men ansi tykkum, annars liggur múrurin sum grótkast fyri ein bátahyl í Sugguni ein penan dag, um skilið sleppur at halda fram.

Umhvørvispolitikkur er meira enn reinir vegir, reinar áir og reinar vágir. Tað er bara ein sjávfylgja, at hetta skal fungera. Umhvørvismál er at fáa alt hetta, sum tíðin krevur, bilar, handlar, o.s.fr. at sampakka við tað sum er. Okkurt gamalt má víkja, men hetta skal gerast við varsemi, Havnin hevur eina elligamla søgu, og tað hava Kirkjubøur, Kollafjørður og hinar bygdirnar í kommununi eisini. Men tað er ikki bara søgan tað snýr seg um, tað er eisini trivnaðurin. Tá ið stórar broytingar skulu gerast, eigur fólkið í grannalagnum at fáa stundir og umstøður at koma við sínum viðmerkingum, tí tað er sjáldan bert ein máti at gera tingini uppá. Hetta við at trumla tingini ígjøgnum uttan fyrilit, er vónandi ein farin tíð. Men so mugu vit eisini standa saman hin 9 novembur, og siga teimum, sum hava rátt fyri borgum, at nú er nokk.

Miðbýurin fyri fólkið

Hildur Eyðunsdóttir
býráðslimur og valevni Tjóðveldisfloksins, www.eydunsdottir.com

VAL04

Eg skilji væl, at eigarin av húsunum hjá Anton Degn kennir seg snýttan. Hann keypti eina ogn, sum ongar treytir hingu við, og ætlaði sær at byggja eini býarhús sum vóru sambært byggisamtyktunum

Men eg haldi ikki at henda byggiætlanin var góð og gagnlig fyri býin. Degnshúsini skulu heldur takast við í eina menningarætlan fyri miðbýin, har Tinghúsvegurin verður umskapaður til trivna og lív, til eina gongugøtu har gomlu urtagarðarnir vera latnir upp fyri almenninginum, har klubbagarðurin verður til fólk at trívast í, sum eitt virðiligt býarpláss frammanfyri Tinghúsini.

Ein íslendskur rithøvundur helt fyri, at Tórshavn var vakrasti høvuðsstaður í norðanlondum, júst tí so nógv av tí gamla var varðveitt. Men tað merkir ikki at einki má henda í býnum. Býurin skal vera livandi og mennast, men menningin skal gerast við ansi fyri tí sum er vert at varðveita, og við at tað sum verður bygt í dag, eisini fer at verða vert at varðveita.

Heildarætlan fyri miðbýin

Málið við Degnshúsunum er eitt gott dømi um at vit mugu hugsa miðbýin á nýggjum. Vit mugu endurskoða byggisamtyktirnar, so vit fáa tann býin sum vit ynskja, ein hugnaligan bý, har fólk búgva, men eisini ein bý sum angar av býarlívi. Útvent virksemi sum handlar, kafé'ir, hárfríðkanarstovur, sjónleikahús, venjingamiðstøðir og mangt annað, skal fáa fólk at trívast í Havn, og vit skulu eisini varðveita bústaðarøki í býnum, tí einki skapar so gott lív sum spælandi børn, sjaggandi gomul og virkin ung. Ein góð heildarætlan er hon sum setur ávís øki av til handilsgøtur og onnur til bústaðarøki.

Keiðið við í miðbýarætlanina

Eisini havnarlagið eigur at vera við í heildarætlanini. Aðrastaðni kring okkum, hava býir valt at flyta góðshavnir útum býin, so hvørt sum bilar, bingjur og skip eru vorðin so stór at tey hótta trivnaðin. Ístaðin eru gomlu havnirnar gjørdar um til býarøki, har mentan og vinna trívist í tí serstaka umhvørvinum sum er framvið sjóvarmálanum. Hetta er gjørt í Keypmannahavn, í London, og tað er eisini í ferð við at blíva gjørt í Reykjavík. Avbjóðingin er hin sama í Havn. Serliga nú altjóða reglur krevja, at keiðið verður stongt fyri almenninginum, er neyðugt at hugsa um aðra nýtslu av havnalagnum. Tað nyttar heldur ikki nógv at tosa um at tálma ferðsluna í miðbýnum, so leingi sum allur farmurin og øll bilferðafólkini skulu um miðbýin. Eisini tí mugu vit taka keiðið í miðbýarætlanina.

Samstundis mugu vit sjálvandi finna útav hvussu vit skipa samferðslu og farmaflutning, so trupulleikarnir ikki bara verða fluttir, men so at hetta virksemið verður til gagns, har tað verður flutt. Ein betri miðbýur skal **ikki** merkja at Kollafjørður ella aðrir útjaðarar gerast verri fyri.

Trivnaður skapar menning

Besta amboðið at fremja trivnaðin í Tórshavnar kommunu, er ein góð heildarætlan, sum verður gjørd í fullum opinleika, so bæði tey sum búgva í kommununi, og tey sum gera íløgur í kommununi kenna seg trygg. Vit skulu skapa ein bý har trivnaðurin verður settur fremst. Har fólk vera tikin framum bilarnar, har mentan og vinna trívist saman.